## Eingir føroyingar á vølli

Hóast føroyskir fótbóltsspælarar eru í hópinum hjá bæði Frem og Fremad Amager, so vóru teir ikki við á vøllinum, tá ið liðni hittust til venjingardyst leygardagin. Atli Danielsen og Rókur av Fløtum Jespersen vóru við landsliðnum í Íslandi, og teir ungu spælararnir í Amager vóru ikki sendir á vøllin hesaferð. Dysturin endaði við javnleiki 3-3.



## Laudrup høgt í metum

Danski fótbóltsvenjarin Michael Laudrup er høgt í metum í sponskum fótbólti. Tað gongur væl hjá Getafe, har hann er venjari, og nú hava stóru feløgini fingið eygað á venjaran, sum var ein legenda sum spælari í Spania. Michael Laudrup hevur fingið tilboð úr bæði Spania og Onglandi, og italsk feløg hava eisini spurt seg fyri. Laudrup hevur tó sáttmála við Getafe til summarið 2009, og tað kostar 15 milliónir krónur at keypa hann leysan áðrenn tað.

# Botnurin er ikki so langt burtur

**At Føroyar ikki longur eru á sama støði sum eitt nú Liktinstein, vísa úrslitini hjá hesum báðum londum ímóti Íslandi**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*



*14 fótbóltstjóðir – harav bert ein úr Europa – eru aftan fyri Føroyar á seinastu útgávuni av altjóða styrkislistanum*

*Mynd: Morgunblaðið*

Í gjár legði fótbóltslandsliðið rygg til 3-0 tap ímóti Íslandi.

Uppgerðin í gjár var tann níggjunda ímóti Íslandi, síðani Føroyar í 1988 fingu limaskap í FIFA. Føroyar hava tapt allar níggju dystirnar. Fyrsti landsdysturin hjá Føroyum í FIFA høpi var júst ímóti Íslandi. 24. august 1988 vann Ísland 1-0 í Akranesi.

Merkisvert er tað, at málverjin og liðformaðurin á landsliðnum í 2008, Jákup Mikkelsen, var 17 ára gamal eykamálverji í fyrsta landsdystinum. Ta ferðina stóð Jens Martin Knudsen, sum nú er hjálparvenjari, millum stólparnar.

3-0 tapið í gjár var tað størsta tey knappliga tjúgu árini, sum Føroyar og Ísland í FIFA høpi hava spælt landsdystir. Níggju innanhýsis uppgerðir hava verið og bara eina ferð áður hava Føroyar tapt við meiri enn einum máli. Tað var 2-0 í vinardysti í Neskaupstaði 2. juli í 1995. Hinar sjey ferðirnar hevur munurin ongantíð verið meiri enn eitt mál.

Í fýra av teimum níggju dystunum ímóti Íslandi, hava Føroyar skorað mál. Í báðum HM undankappingardystunum í 2003 vann Ísland 2-1.

4. februar í 2000 spældu grannarnir NM kappingardyst í La Manga í Spania. Ísland vann 3-2, eftir at Føroyar í steðginum høvdu verið á odda 2-1.

### Altjóða støðan er nógv viknað

Pílurin hjá Føroyum hevur leingi peikað skeiva vegin á FIFA styrkislistanum, og úrslitið í gjár fer ikki at betra um støðuna.

Seinasti FIFA listin er tann frá mars. Á honum er Ísland á 89. plássi, og Føroyar eru á 193. plássinum. Íslandi hava 366 stig, og Føroyar hava 14 stig. Stigatalið hjá Føroyum er tað sama, sum tað var í februar, men Føroyar hava kortini lyft seg frá 195. plássinum í februar.

Fjúrtan fótbóltstjóðir eru aftanfyri Føroyar á styrkislistanum. Av teimum er bara ein úr Europa. Tað er San Marino, sum hevur fimm stig og er nummar 198. Aðrar europeiskar tjóðir, sum Føroyar hava verið frammanfyri, eru Andorra, Luksemborg og Liktinstein. Hesar eru nú ávikavíst nummar 179, og Liktinstein, sum er nummar 152 við 260 stigum.

Nú eru altso 256 stig og 41 pláss ímillum Føroyar og Liktinstein. Føroyar og Liktinstein hava tríggjar ferðir spælt ímóti hvørjum øðrum í vinardystum, og Føroyar hava vunnið allar dystirnar. 26. apríl í 2000 var úrslitið í Vaduz 1-0 til Føroyar, á Kypros 13. februar í 2002 var úrslitið eisini 1-0 til Føroyar, og 19. august í 2002 vunnu Føroyar í Havn 3-1 á Liktinstein.

Nú tað í fleiri ár hevur gingið rætta vegin hjá Liktinstein, meðan Føroyar eru farnar skeiva vegin, hevði tað verið áhugavert við nýggjari uppgerð fyri at vita, hvussu innanhýsis styrkismunurin nú er.

### Góð úrslit ímóti Íslandi

Kanska kunnu avrikini hjá Føroyum og Liktinstein ímóti Íslandi nýtast sum metingargrundarlag fyri, hvussu tað er møguleiki fyri, at tað fer at tørna út, um ella tá ið Føroyar og Liktinstein aftur fara at spæla.

Í EM undankappingini, sum varð avgreidd í 2006 og í 2007, vóru Ísland og Liktinstein í bólki saman. 2. juni síðsta summar vitjaði Liktinstein á Laugardalsvøllinum. Úrslitið var 1-1 eftir at Íslandi hevði verið á odda eftir 1. hálvleik. Liktinstein stóð seg altso betri í Reykjavík, enn Føroyar gjørdu í 2003, tá ið Ísland vann undankappingardystirnar báðar 2-1.

Liktinstein stóð seg uppaftur betur, tá ið Ísland 17. oktober 2007 vitjaði í Vaduz. Liktinstein vann 3-0, eftir at hálvleiksstøðan hevði verið 1-0!

Í gjár var føroyska liðið ikki fullmannað, um tað ber til at siga tað soleiðis. Tríggir og kanska fýra og fimm spælarar, sum møguliga høvdu verið ímillum teir fyrstu ellivu, vóru ikki við: Jón Rói Jacobsen, Súni Olsen, Christian Lamhauge Holst, Jákup á Borg og Andrew av Fløtum. Men so skal eisini havast í huga, at íslendska liðið hesa ferð var heilt øðrvísi mannað, enn tað var, tá ið stinnasta íslendska liðið spældi ímóti stinnasta liðnum hjá Liktinstein.

Eingir teirra, sum vóru við til at tapa í Liktinstein, vóru við í gjár, og heldur ikki íslendingarnir, sum vóru eykamenn í Vaduz, vóru við til at manna íslendska liðið í gjár.

So tað ber ikki til at staðfesta annað, enn at útgangsstøðið ikki er serliga gott í altjóða høpi, nú Føroyar fyrireika seg til nýggja undankapping. Tað hugaliga í tí er, at tað eiga at vera góðir møguleikar fyri, at tað skal ganga betri, tí botnurin er ikki so langt burtur.

# Atli er nú limur í 25 felagnum

**Frem miðvallarin spældi ein tíma á Amager leygardagin, áðrenn hann leygarkvøldið kom til Reykjavíkar at taka lut í fyrireikingunum til jubileumsdystin**

FÓTBÓLTUR
*Jóannes Hansen*
*joannes@sosialurin.fo*

Atli Danielsen var í gjár fyri 25. ferð á føroyska fótbóltslandsliðnum. Atli er tann 30. føroyingurin, sum hevur rokkið 25 landsdystum.

Merkisvert var tað, at Atli var á vøllinum allar 90 minuttirnar hesa ferð. Tað var merkisvert, tí Atli leygardagin spældi ein lítlan tíma í venjingardysti fyri felagið hjá sær – í Keypmannahavn!

Atli var ikki í ferðalagnum, tá ið landsliðið fríggjadagin fór úr Vágum og til Reykjavíkar. Felagið hjá landsliðsspælaranum, Frem, spældi seinnapartin leygardagin venjingardyst á Amager ímóti felagnum hjá Toda Jónsson, FC Amager.

Frem skal skírisdag spæla fyrsta landskappingardystin síðani vetrarsteðgin. Hann verður á heimavøllinum í Valby ímóti SønderjyskE. Venjarin roknar Atla Danielsen sum ein av lyklaspælarunum, og tí var tað týdningarmikið, at Atli var við í venjingardystinum leygardagin.

Tá ið ein lítil tími var runnin av uppgerðini, sum endaði 3-3, varð Atli skiftur út. Hann fór umvegis umklæðingarrúmið beinleiðis út í Kastrup og við flogfarinum til Keflavíkar.

Jógvan Martin Olsen vildi ógvuliga fegin hava, at Atli Danielsen var millum teir fyrstu ellivu í gjár. Atli mannaði sentrala miðvøllin saman við Inga Højsted. Tað varð roknað við, at Atli kanska fór at vera á vøllinum í ein tíma ella so, men tað tørnaði soleiðis út, at Atli spældi alla tíðina.

Atli Danielsen var fyrstu ferð á landsliðnum 27. apríl í 2003, tá ið Føroyar á Toftum vunnu vinardyst ímóti Kasakstan 3-2. Í 66. minutti loysti Atli Hans Fróða Hansen av.

Í teimum 25 umboðanunum fyri Føroyar hevur Atli Danielsen spælt á nógvum plássum. Umframt á sentrala miðvøllinum hevur hann verið miðvallari í høgru, vongverji í báðum borðum og eisini í miðverjuni.

Tað verður neyvan nakar annar spælari, sum í 2008 fer at røkka 25 landsdystum. Teir næstu í røðini eru Símun Samuelsen, sum hevur umboðað Føroyar 16 ferðir, og Hjalgrím Elttør, sum í gjár var á landsliðnum fyri 15. ferð.